

# STARVSFÓLK TIL KRÁSADEILDINA Í MIKLAGARÐI

Søkt verður fólki M/K til at arbeiða fulla tíð í krásadeildini í Miklagarði. Ert tú framúr kundavinarlig/ur, opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði, við nógvum starvsfólkum, í einum nógv vitjaðum umhvørvi.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

**SEND UMSÓKNINA TIL:**

Slaktarin, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn
ella send ein teldupost til jorgen@jyde.dk
Tú kanst eisini ringja 31 52 62 og spyrja eftir Eydnu.

MIKLAGARÐUR

Døgg

# Lesið Sosialin -so eru tit við!



## Starvslesandi í Vinnuhúsinum

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Við hesum verður søkt eftir starvslesandi til Vinnuhúsið seinna hálvár 2007. Lesandi kunnu søkja um at koma í starvsvenjing, um tey t.d. hava áhuga í at kunna seg um ávíst vinnuøki í samband við lestraruppgávu ella í samband við teirra lestrarøki sum heild.

**Uppgávur**
Tann starvslesandi fær eina høvuðsuppgávu at loysa, sum er tengd at fakligu bakgrundini hjá viðkomandi og tørvinum hjá Vinnuhúsinum. Dømi um eina tílíka uppgávu er at gera kunningartilfar til heimasíðuna, kanna marknaðir, skriva frágreiðing um altjóða rák, gera greiningar av eini vinnugrein ella líknandi. Harafturat kemur tann starvslesandi luttaka í dagliga arbeiðnum í Vinnuhúsinum.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi við hægri háskúla og skal í minsta lagi hava lokið útbúgving á bachelor stigi.

Tey, ið søkja, eiga at hava góð samstarvsevni, vera ágrýtin, miðvís, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga umframt hetta at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Setanartreytir**
Starvið er skipað eftir somu reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi hjá tí almenna og er ólønt. Viðbót verður tó latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðul verður veittur til bústaðarútreiðslur.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jan Mortensen ella Maritu Rasmussen, tlf. 309900. Meira kunning um Vinnuhúsið er at finna á www.industry.fo

Umsókn við prógvum og/ella avriti av úrslitum higartil skal sendast til:

Vinnuhúsið
Postboks 1038,
FO-110 Tórshavn

Ella við telduposti til: industry@industry.fo

Umsóknarfreistin er 11. juni 2007.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 15 vinnufeløgum. Í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini. Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

Smærugøta 9A, FO-100 Tórshavn
Tel 30 99 00, Fax 30 99 01
industry@industry.fo, www.industry.fo

www.sansir.fo